## Keðiligt í Aalborg

Danskir fjølmiðlar skriva, at superligadysturin ímillum AaB og Esbjerg í Aalborg sunnudagin var nakað av tí keðiligasta, sum hevur verið at sæð í superliguni í langa tíð. Bert eitt mál kom í dystinum, og tað gjørdi Jeep Curth fyri AaB seks minuttir fyri leiklok. Hvørgin av teimum føroysku spælarunum hjá AaB vóru við í dystinum. Jón Rói Jacobsen er skaddur, og Súni Olsen varð við landsliðnum, sum spældi venjingardyst í Póllandi.

**-ek**

## Fólk minnast Fisker fyri gul og reyð kort

Um vikuskiftið takkaðu tríggir kendir danskir fótbóltsdómarar fyri seg. Ein teirra var tann nógv umrøddi Knud Erik Fisker. Hann bríkslaði seinasta dystin í Parkini í gjár, og hann var fegin um, at hann nú kundi leggja floytuna á hillina.

– Eg vildi ynskt, at fólk mintust meg fyri at vera ein góðan dómara, men tað er einki at ivast í, at fólk fara at minnist meg fyri tey gulu og reyðu kortini, sum eg havi givið, segði Knud Erik Fisker við onside.dk

**-ek**

## FIFA herðir dopingreglan

Altjóða fótbóltssambandið FIFA tekur nú stig til, at dopingreglurnar hjá felagsskapinum verða gjørdar strangari. Hetta hevur leingi verið eitt krav frá anti-dopingfelagsskapinum WADA, men FIFA hevur ikki vilja viðurkent kravið og hevur havt sínar egnu reglur. Altjóða ítróttardómstólurin CAS hevur gjørt greitt, at FIFA skal eftirlíka krøvunum frá WADE, og nú verða broytingar gjørdar undan HM-endaspælinum í Týsklandi í summar.

-ek

## Byrial endaði við tapi

Johan Byrial Hansen spældi í gjár sín seinasta dyst fyri AC Horsens. Dysturin var á útivølli ímóti FC Nordsjællandi, sum vann heili 3-0. Johan Byrial Hansen gevst nú at spæla fótbólt, tí hann ætlar sær at brúka meira tíð til familjuna og arbeiðið. AC Horsens flutti upp úr næstbestu deildini í Danmark í fjør, og tað hevur eydnast liðnum at varðveita sítt pláss í superliguni. AC Horsens spælir tí aftur millum tey bestu næsta kappingarár.



## Jimmy undir skurð

Málmaðurin hjá AaB, Jimmy Nielsen, verður í vikuni lagdur undir skurð. Talan er ikki um nakran álvarsaman skaða, men ein meniskskaði í knænum skal fáast upp á pláss.

– Eg havi merkt skaðan alt kappingarárið, so tað verður gott at sleppa av við hann nú, sigur Jimmy Nielsen við Ekstrablaðið.

Og sambært blaðnum er Jimmy helst fegin um at fáa frí frá fótbóltinum júst nú, tí fríggjadagin fingu hann og konan eina dóttur.

# Heðin heldur fram sum ÍSF-forseti




*– Eg havi framvegis stóran áhuga fyri uppgávuni, og orkan er eisini til tað, tí havi eg valt at halda fram sum ÍSF-forseti í tvey ár afturat. Men hetta verður helst mítt seinasta skeið í ÍSF, sigur Heðin Mortensen*

**Bara eitt uppskot er til forsetavalið í Ítróttarsambandi Føroya leygardagin. Heðin Mortensen, sum hevur verið forseti fyri føroyska ítróttin í 26 ár, heldur fram í sessinum í tvey ár afturat, men hann roknar við, at tað verður seinasta skeiðið hjá honum**

ÍSF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið freistin fyri at lata uppskot inn til forsetavalið í Ítróttarsambandi Føroya var úti, var einki annað uppskot enn sitandi forseti.

Ítróttar-Sosialurin veit um, at arbeitt var við at stilla eitt mótvalevni upp ímóti Heðini Mortensen, men eingin vildi taka kappingina upp við forsetan, sum hevur sitið í sessinum seinastu 26 árini.

Tí verður Heðin Mortensen valdur til ÍSF-forseta í eitt nýtt tvey ára skeið, tá ið ÍSF hevur aðalfund á Hotel Føroym leygardagin.

– Eg havi framvegis stóran áhuga fyri hesari uppgávuni, og orkan er eisini til tað, tí havi eg valt at halda fram í tvey ár afturat. Men hetta verður helst mítt seinasta skeið sum ÍSF-forseti, sigur Heðin Mortensen.

### Borgarstjóri og forseti

Tað var í mars mánaði í 1980, at Heðin Mortensen varð valdur til forseta í Ítróttarsambandi Føroya, og øll árini síðani hevur hann verið ítróttarligt yvirhøvd í føroyskum ítrótti.

Seinastu tvey árini hevur Heðin Mortensen verið borgarstjóri í Havn, og tað er tey, sum halda, at hetta ikki hóskar saman við uppgávuna sum ÍSF-forseti.

Heðin Mortensen heldur tó, at eingin vansi er í hesum.

– Eg havi ongar trupulleikar við at vera borgarstjóri og ÍSF-forseti samstundis. Eg haldi, at føroyskur ítróttur hevur ein fyrimun av hesum, tí ítrótturin hevur eitt politiskt talurør, har avgerðirnar verða tiknar, sigur Heðin Mortensen.

Uppgávan sum borgarstjóri í Havn er krevjandi. Hevur tú tíð at verða forseti fyri ÍSF eisini?

– Ja, tað sigur seg sjálvt, at eg havi ikki nógva frítíð. Arbeiðið sum forseti í ÍSF er sjálvboðið arbeiði, og eg brúki mína frítíð til hesa uppgávu. Vit hava eina umsiting í ÍSF, og tað ger mína uppgávu lættari, men tað krevur framvegis nógva tíð og orku. Hetta er mítt filantropiska arbeiði, og soleiðis rokni eg eisini við, at tað verður frameftir, tí ÍSF hevur ikki ráð til ein løntan forseta.

### Uppgávur eftir at loysa

Heðin Mortensen sigur, at hann heldur fram sum forseti í ÍSF, tí hann framvegis hevur arbeiðið eftir at gera fyri føroyskan ítrótt.

– Tað eru nøkur ting, sum eg gjarna vil gera liðug, áðrenn eg gevist sum forseti. Eitt er limaskapurin í IOC, eitt annað eru fíggjarligu umstøðurnar hjá ÍSF, og harafturat fer leikluturin hjá ÍSF í føroyskum ítrótti eisini at broytast í næstum, sigur Heðin Mortensen.

– Hinvegin ásanni eg eisini, at nýggjar tíðir eru á veg í føroyskum ítrótti, og tí verður hetta helst mítt seinasta skeið sum ÍSF-forseti.

Forsetavalið í ÍSF verður á aðalfundinum, sum verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin. Tað eru føroysku ítróttarfeløgini, sum saman við sersambondunum velja forsetan. Hesaferð verður einki at velja ímillum, tí Heðin Mortensen er einasta uppskotið.

## Oyggjaleikir aftur til Føroyar

Eitt av málunum, sum Ítróttarsamband Føroya ætlar sær at arbeiða við næstu árini, er at fáa Oyggjaleikirnar aftur til Føroya.

– Vit ætla at søkja um vertsskapin til leikirnar í 2013, men skal tað bera til, so skal arbeiðið fyri hesum byrja longu nú. Vit skulu hava nýggjar fasilitetir til ítróttin, og tað skal nógv gerast, áðrenn vit kunnu taka leikirnar aftur, sigur Heðin Mortensen.

– Hetta er nakað, sum vit eru farin í holt við í ÍSF, men vit skulu hava land, kommunur og onnur við, um hetta skal lata seg gera. Øll mugu virka fyri at fáa Oyggjaleikirnar aftur til Føroya, um vit skulu hava nakran kjans, sigur hann.

## Frem spældi málleysan dyst

Undirhaldið var millum lítið og einki, tá ið danska 1. deildarliðið Frem spældi ímóti Lolland Falster Alliancen á heimavølli í gjár. Einki mál kom í dystinum, og tað segði nógv um, hvussu liðini spældu. Teir 1270 áskoðararnir sóu eitt tannleys álop hjá heimaliðnum, men verjan, har Jónas Tór Næs spældi allar 90 minuttirnar sum høgri bakkur, kláraði í minsta lagi at halda málið reint.

**-ek**